Barnamøti er samstundis. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Palla Højgaard.

**Hvannasund - Skúlin**
Møti verður í gamla skúla sunnukvøldið kl. 18 við Poul Christoffur og Ásu Joensen.

**Vikuskiftismøtir í Kallsoy 27.-30. november 2008**
**Fríggjakvøldið 28. nov.**
**Kirkjan á Húsum**
Kl. 19.30 Møti við Torleif Johannessen - Sangur: Streingjakórið í KFUM & K í Klaksvík
**Leygarkvøldið 29. nov.**
Kirkjan í Mikladali
Kl. 19.30 Møti við: Jákup Petersen - Sangur: Ung úr KFUM & K
**Sunnudagin 30. okt.**
Kirkjan á Húsum
kl. 11 Gudstænasta v/Hanus Simonsen
Kirkjan í Mikladali kl. 12.15 Gudstænasta v/Hanus Simonsen. Altargongd
Skúlin á Syðradali kl. 16 Møti við: Aksel Zachariassen og Óla Poulsen - Sangur: Óli Poulsen.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti. Innsavnan. Hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 15 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.

**Eiriksgarður, Dalur**
Møti verður fríggjakvøldið og leygarkvøldið; bæði kvøldini kl. 19, Niels Jacob Nielsen talar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli vegna barnafamiljuguðstænastu og onki møti vegna missiónsviku í Fámjin.
Týskvøldið bíbliutími - Markus kap. 4.

**Aglow Suðuroy**
Jólahugni fyri kvinnur og menn verður í Frelsunarherinum í Vági leygardagin 29/11 kl. 20.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónsvika í kirkjuni í Famjin**
Fríggjadag kl. 18 Bergur D. Joensen talar. Streingjakórið í Porkeri syngur.
Leygardag kl. 18 Bergur D. Joensen talar.
Sunnudag kl. 18 Jógvan Højgaard talar. Streingjakórið á Tvøroyri syngur.
Aftaná møti fríggja- og leygardag verður drekka og hjúnini Asta og Bergur siga frá ferð teirra úti í heimi. Myndir verða vístar.
Gevið gætur! Øll møtini byrja kl. 18.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v. Anniku Vilhelm. Niels Hammer syngur.
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími og bønarløta.

**Bethel, Vágur**
Fríggjakvøldið 28. november kl. 20 Møti, John í Skemmuni talar, Árni Jensen og Sela syngja.
Leygarkvøldið 29. november kl. 20 Møti, John í Skemmuni talar, Árni Jensen og Sela syngja.
Sunnudagin 30. november
kl. 11 Breyðbróting
kl. 13.30 Sunnudagsskúli
kl. 18 Evangeliskt møti, John í skemmuni talar, Árni Jensen og Sela syngja.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 17 jólatræið verður tendra í Vági.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti/sunnudagskúli,
kl. 18 evang. møti. Luttøka v/ Ólavur í Trøðini og fleiri.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.
Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið.

**Møti í bygdarhúsinum í Lopra**
Møti sunnukvøldið kl. 18.

**Møti í Betania í Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491*
*Fax 316481 · Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
***Vika 49***
***Mánadagur***
kl. 09.00 -12.00 Horn- og beinarbeiði Rasmuns Nygaard - Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga
10.00 - Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 - Enskt talumál
14.00 - Kortspæl og onnur spøl
10.00 - 17.00 Jólasøla í kjallaranum
***Nýtt:***
***Annað hvønn mikudag og fríggjadag kl. 15.00 - 15.30 fer Danjal Húsgarð at hava fimleik fyri monnum í Tilhaldinum, byrja verður 13. feb. 2009***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
***Týsdag:*** Fimleikur.
***Mikudag:*** Ítriv.
***Hósdag:*** Teldukunning.
Opið er kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi Glyvrar**
Tlf. 448279
Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00.
Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.
***Skrá viku 49.***
***Mánadagur 1. des.***
Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Sunda pensionistafelag**
Jólaveitslan verður í Bygdahúsinum í Hósvík leygardagin 13. des. kl. 17.00
Seinasta freist at tekna seg er leygardagin 6. dec. á tlf. 422152/271073 ella 422376.
Minnist til at hava jólapakka við. Bussur koyrir frá streyminum.

**Vága Pensionistafelag**
hevur hugnaligt jólaborðhald á Hotel Vágum fríggjakvøldið 5. desember kl. 19. Gott undirhald og góður døgurði. Kostnaður 125 kr. Tú ert vælkomin at tekna teg á tlf. 332512 í seinasta lagi mánadagin 1. desember.

**Tilboð til eldri í Suðuroyar sunnaru helvt**
Eldrahugni verður í Eldrasambýlinum í Vági onskvøldið 3/12-08. Á skránni verður sangur og upplestur. Kaffi og køkur eru at fáa. ***Tey, ið mangla flutning kunnu ringja 373096.***
*Fyrireikararnir*

**Føroyingar í Århus**
**Góðu tit øll!**
Komandi tíðina verða nógv góð tiltøk fyri føroyingarnar í Århus:
***30. novembur kl. 14.30*** verður føroysk jólaguðstænasta í Ravnsbjerg kirke. Derhard Olsen prædikar, jólamenn koma at vitja og møguleiki verður at senda jólaheilsur til Føroya.
***6. des.*** Verður jólakonsert við Magna Christiansen.
***7. des.*** verður jólahugni í Eben Ezer í Brammersgade 4, 8000 Århus.
Lesið meira um ymsu tiltøkini á www.aarstova.dk !

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit hava opið týsdag, mikudag og hósdag kl. 15-18 í Luffustovu.

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin í Sandoy hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Vesturskin Toftir**
Opið týsdag, mikudag og hósdag frá kl 15-18. Øll eldri eru vælkomin.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Vágs pensjonistafelag**
Jólaveitslan verður 6. des. kl. 18.00 á Bakkanum. Havi jólapakka við og eitt oyra til lutaseðlar.

# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vóru við at gera hjúnabandsdag okkara 08.08.08 so væleydnaðan og ógloymandi. Takk fyri talur, gávur og fjarrit.*
***Ynskja Kathrina og Jákup***



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust okkum á hjúnabandsdegi okkara 23. august 2008, og sum gjørdu okkum dagin so hugnaligan og ógloymandi. Ein serlig tøkk til tykkum, sum hjálptu til bæði innan- og uttandura.*
***Heilsan Simona og Jóan Carl***



*Øllum tykkum, ið á ymiskan hátt mintust okkum á gullbrúdleypsdegnum tann 6. september 2008 og á 70 ára føðingardøgum okkara, takka vit hjartaliga.*
***Kærar heilsanir Maria og Ólavur***

**Brúdleyp**
Týsdagin 30. des giftast Andrea Debes, Oyri og Hans Andreas Nolsøe Dahl, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 15.00. Veitslan verður í Eydnuni á Oyrarbakka kl 19.00 Tey ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin at siga frá á tel. 212396-586809 innan 4. des.

**60 ár**
5. januar verður Mortan Johannesen (Mortan hjá Hans Paula) 60 ár, dagurin verður hildin leygardagin 3. januar, kl. 19.00, í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøtu 9. Tey í vilja gleða hann við at koma, kunnu boða frá við at ringja á 21 12 97 - Magni, ella 31 41 65 - Elisabeth, ella senda t-post: magni@mjsalt.fo, innan 19. desember.

**70 ára føðingardagur**
Leygardagin 6. desember klokkan 19 heldur Fríðálvur Eysturberg í Hvalba 70 ára føðingardag í Roynhøllini. Tað vildi glett meg at sæð familju, vinir og kenningar í føðingardegi. Tey, ið ætla at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá fyri 1. desember á tlf. 375097 ella á tlf. 278188 .

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 30. desember hava Elin og Virgar Dahl, Oyri, silvurbrúdleyp. Veitslan verður á Hotel Føroyum sama dag kl. 19.00. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 14. des. á tlf. 422321, 217313 og 258284.

**Silvurbrúdleyp**
10. desembur hava hjúnini Lív og Jóhan S. Jensen á Toftum verið gift í 25 ár. Í hesum sambandi, verður opið hús í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum, leygardagin 13. des. millum kl. 11 og 18.

**silvurbrúdleyp**



Tann 17. des. 2008 kunnu Maja (f. Tausen) og Marni A. Niclasen hátíðarhalda teirra silvurbrúdleyp. Tey, ið ynskja at gleða okkum henda dagin/kvøldið, eru vælkomin í Evangeliihúsið (Tróndargøta 36, Havn) til eina hugnaløtu kl. 18.30 við fjølbroyttum innihaldi og kaffiborði. Sig frá innan 10. des. á marni. niclasen@gmail.com ella tlf. 316026 el. 593423.
***Maja & Marni***

**Gullbrúdleyp**
Hósdagin 18. desember hava hjúnini Ragnhild og Palli Olsen í Fuglafirði verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík fríggjadagin 19. des. kl. 19. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 1. des. á tel. 44240, 445036 (Malan) ella 598237 (Óluva).

Leygardagin 3. jan 2009, giftast Vivi E. Joensen Lamba og Virgar Poulsen Fuglafjørður.
Tey, ið vilja gleða okkum við at koma til brúdleypið, kunnu tekna seg, við at ringja á tlf. 504231 ella 774440. Seinasta freist at tekna seg er 11. des 2008.
Vígslan verður í Elim í Søldarfirði kl 12.00, og veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl 17.00



***Vivi & Virgar***